



# Joey Moe sum jokari

**Danski sangarin Joey Moe, sum seinastu vikurnar hevur hittað við sanginum Yo-Yo, verður eisini at hoyra á Summar Festivalinum. Hann er serligur gestur undir framførsluni hjá Nik & Jay**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*



Joey Moe telist millum teir yngru og framfýsnu sangararnar í Danmark. Í 2006 fekk hann eitt stórt hitt í Danmark við sanginum Flip It (Like A DJ), og tann sangurin var eisini tráspældur í Føroyum.

Joey Moe vitjaði eisini í Føroyum um tað mundið, og tað vóru sera nógv fólk til hansara framførslu.

Nú er Joey Moe aftur at finna á hitlistunum í Danmark. Sangurin Yo-Yo hevur verið at finna ovarliga á Tjeklistanum hjá DR seinastu 10 vikurnar, og sangurin hevur eisini verið á øðrum hitlistum.

Joey Moe verður við í ferðalagnum, tá Nik & Jay koma til Føroya hesa vikuna, og Joey Moe kann eisini upplivast saman við Nik & Jay á pallinum á Summar Festivalinum hóskvøldið.

Og sum um tað ikki var nóg mikið, so verða eisini sangarin Jinks og DJ Morten Breum, sum verður roknaður sum besti plátuvendarin í Danmark í løtuni, við í showinum hjá Nik & Jay á Summar Festivalinum.

Nik & Jay hava havt onkra einstaka framførslu við hesum gestum í Danmark, og tær hava riggað so væl, at tað verða fleiri av hesum framførslum í summar.

# FAROE 5 spíla seg út til endaspurt

**Við bólki, onkrum nýggjum løgum og ikki minst hitt-røðini lata FAROE 5 stóra pallin á Vágsbøi upp leygardagin. Summarfestivalurin er endaspurturin á sumrinum, sigur Lillian Dalsgaard**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Ársgamli gentubólkurin hevur havt úr at gera hetta summarið. Konsertirnar hava verið fleiri í tali, og venjingin sera hørð. Nú eru tær tilreiðar at taka áhoyrararnar á Summarfestivalinum við storm. Tær fimm í FAROE 5 gleða seg sera nógv til at framførsluna á festivalinum, sum samstundis er endaspurturin á sumrinum.

- Vit gleða okkum nógv til at framføra á stóra pallinum, sigur Lillian Dalsgaard og leggur afturat, at tær ongantíð hava framført á so stórum palli áður. Og tað skal gagnnýtast.

## Fleiri á palli

Tey verða munandi fleiri á pallinum í ár enn í fjør, tá gentubólkurin trínur á pall leygardagin á Summarfestivalinum. Afturat sær hava tær fingið ein bólk við góðum tónleikarum og eisini verður ein rappari við.

- Við fleiri fólkum, gerst talan um eitt størri show, sigur Lillian Dalsgaard og frøist um, at tær eru slopnar upp á stóra pallin, tí annars kundi tað verðið dekan ov trongligt.

- Tað er jú fantastiskt at hava tónleikarar afturat okkum. Tað lyftir framførsluna hjá okkum upp og gevur eyka orku. Tað gevur heilt víst eisini okkurt "visuelt", heldur Lillian fyri.

FAROE 5 ætla sær ikki bara at framføra kend løg. Tær arbeiða í løtuni við eini nýggjar útgávu, og tí verða onkur nýggj løg á skránni. Men sjálvandi fara tær eisini at framføra øll tey kendu hittini, sum hava ljóðað hetta seinasta árið.



## Hart summar

FAROE 5 hava arbeitt sera hart fram til hetta summarið. Síðani bólkurin varð til fyri góðum ári síðani, hava genturnar arbeitt miðvíst fram ímóti at gerast betri og betri. Framgongdin hevur verið eyðsýnd hetta summarið, tí genturnar hava fingið fleiri góð ummæli eftir tær ymsu konsertirnar, sum tær hava hildið.

- Tað er stórur munur á í ár og í fjør. Og ikki minst er tað deiligt at síggja, at nógva venjingin og harða arbeiðið hevur loyst seg so væl, sigur Lillian Dalsgaard.

Genturnar í FAROE 5 hava havt 12 dagar summarfrí seinastu mánaðirnar, annars er øll tíðin farin til venjing.

- Fyri framman liggur ein spennandi vetur, men nú taka vit líka endan á summarinum við, sigur Lillian Dalsgaard.



## Túnatos

**Ragnhild hittir í dag Joan Neshamar úr Havn. Joan er 33 ára gomul og skúlastjóri á Velbastaðar Skúla.**

**1. Ætlar tú tær á SF í ár?**
*Eg havi ikki avgjørt enn, um eg fari. Havi ikki ætla mær, men nú tað stundar ímóti festivalinum, eri eg farin at umhugsa støðuna. Havi verið á øllum teim undanfarnu Summar Festivalinum.*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*Heilt klárt The Scorpions í 2007. Men eg má siga, at einki er sum tá Dynamit spælir á Vágsbøi – tá er lív í og ótrúliga stuttligt!*

**3. Svevur tú í tjald ella í ordiligari song, tá tú ert á SF?**
*Eg havi sovið í tjaldi eina ferð og tað verður ikki gjørt aftur. Tað var heldur vátt tað árið, so tað bleiv nakað langt at ganga út í Grøv.*

**4. Hvør hevur verið løgnasta uppliving, tú hevur havt á SF?**
*Eg veit ikki ordiliga, hvussu nógvar løgnar upplivingar, eg havi havt – men haldi tað verða løgið, at hóast veður og vind, so eru fólk í góðum lag. Og tað skal nógv til at koppa føroyingum í veistluhugi..*

**5. Hvønn kundi tú hugsað tær at hoyrt á SF 2010?**
*Tað hevur altíð verið ein dreymur at hoyrt Bon Jovi. Havi ikki havt møguleikan til tað enn – so um hann stóð á pallinum komandi ár. Ja! :)*